# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Metstórur sigur á Anfield



Peter Crouch sæst her torna yvir øllum, í dysti móti Besiktas í gjárkvøldið. Hann gjørdi tvey av málunum í knúsandi 8-0 sigrinum hjá Liverpool

**Fjórða umfar av Champions League-bólkaspælinum varð leikt í gjárkvøldið. Átta dystir vórðu leiktir í gjárkvøldið, meðan hinir átta verða leiktir í kvøld. Liverpool hevði skotvenjing á heimavølli í kvøld, tá ið teir vunnu heili 8-0 á einum spøkum Besiktas-liði. Sigurin er tann størsti í Champions League nakrantíð**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Liverpool skuldi í gjárkvøldið, heima á Anfield Road, royna at reisa seg eftir eina trilvandi byrjan í bólki A í Champions League. Mótstøðuliðið var turkiska Besiktas, og hesir vórðu sendir heim við einum lemjandi ósigri í viðførinum.

Úrslitið gjørdist heili 8-0 til Liverpool. Ein dystur, har Besiktas als einki hevði at bjóða, og Liverpool hevði lætt spæl. Liverpool hevði 19 skot á mál, meðan Besiktas hevði eittans skot á mál.

Ísraelski Benayoun skeyt hattrikk, Ryan Babel og Peter Crouch tvey í part, meðan Steven Gerrard skeyt eitt.

Liverpool hevur nú lyft seg upp á 3. pláss í bólki A, og er framvegis fýra stig aftanfyri FC Porto á fyrsta plássi.

## Rosenborg enn eitt bragd

Fyri aðru ferð innan tvær vikur, megnaði norska Rosenborg at vinna á Valencia, hesuferð á útivølli á Mestalla leikvøllinum í Spania. Við tveimum málum frá Steffen Iversen, ið fyrr hevur spælt við m.a. enska felagnum Tottenham. Fyri tveimum vikum síðani megnaðu Rosenborg, júst sama úrslit á heimavølli í Trondheimi.

## Chelsea og Real skuffaðu

Bæði Chelsea fingu óvæntaðar javnleikir. Í Týsklandi fekk Chelsea bert málleysan javnleik móti Schalke04, og í Grikkalandi fekk kongaliga felagið Real Madrid eisini bert málleysan javnleik, móti Olympiakos. Hetta er í báðum førum talan um dystir, ið Chelsea og Real áttu at vunnið.

## Milan vísir styrki

Í Ukraina tóku Shakhtar Donetsk móti meistarunum úr Milano, AC Milan, og har vísti italiumenn at teir veruliga hava, hvat krevst. Tí við sikrum 0-3 sigri, vunnu teir sær enn ein sigur í Champions League høpi. Málini gjørdu Inzaghi tvey og Kaka eitt.

### FAKTA

**Úrslit og málskorarar frá dystunum í gjárkvøldið:**

**FC Porto – Marseille 2-1 (1-0)**
1-0: Sektioui
1-1: Niang
2-1: Lisandro

**Liverpool – Besiktas 8-0 (2-0)**
1-0: Crouch
2-0: Benayoun
3-0: Benayoun
4-0: Benayoun
5-0: Gerrard
6-0: Babel
7-0: Babel
8-0: Crouch

**Shalke 04 – Chelsea 0-0 (0-0)**

**Valencia – Rosenborg 0-2 (0-1)**
0-1: Iversen
0-2: Iversen

**Olympiakos – Real Madrid 0-0 (0-0)**

**Lazio – Werder Bremen 2-1 (0-0)**
1-0: Rocchi
2-0: Rocchi
2-1: Diego (br.)

**Celtic – Benfica 1-0 (1-0)**
1-0: McGeady

**Shaktar Donetsk – AC Milan 0-3 (0-0)**
0-1: Inzaghi
0-2: Kaka
0-3: Inzaghi

### FAKTA

Dystirnir í Champions League í kvøld eru:

Barcelona – Rangers
Lyon – VfB Stuttgart

Man Utd – Dynamo Kiev
Sporting – Roma

Fenerbahce – PSV
Inter – CSKA Moscow

Slavia Prague – Arsenal
Steua Bucaresti - Sevilla

# Kaka er favorittur til at vinna Gylta Bóltin

**Altjóða ítróttarjournalistar skulu í næstum velja "Ársins Leikara". Nógvir eru um boðið, men tað tykist longu rættuliga greitt, at Kaka fer avstað við prísinum.**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað var afturi í 1956, at kenda franska fótbóltsblaðið "France Football" á fyrsta sinni skipaði fyri atkvøðugreiðsluni um "Ársins Leikara í Evropa". Fyrsta árið vann enska legendan; Stanley Matthews, sum leikti við Blackpool. Matthevs nærkaðist hálvu øldini, áðrenn hann legði skógvarnar á hilluna. Hann var 41 ára gamal, tá hann fekk stóru viðurkenningina í 1956. Tey næstu 39 árini, fram til 1995 kundu bara føddir evropearar vinna "Gylta Bóltin", ella "Ballon D´or", sum hann nevnist á fronskum. Frá 1995 hava leikarar frá øðrum heimspørtum, sum hava leikt við evropeiskum feløgum eisini havt møguleikan at vinna Gylta Bóltin. Og longu í 1995, var tað afrikanski George Weah frá Liberia, sum streyk avstað við sigrinum. Í ár hevur altjóðagerðin veruliga innheinta Gylta Bóltin. Tí nú kunnu leikarar, ið leika í øðrum heimspartum eisini vinna Ballon D´or.

## Kaka favorittur

29 ára gamli fílabeins-strandingurin hjá Chelsea; Didier Drogba. Bert 20 ára gamli, argentinski Messi hjá Barcelona, og 22 ára gamli Christiano Ronaldo úr Portugal og Manchester United eru millum teir nomineraðu. Men hjá flest øllum garvaðum ítróttarjournalistum er nærum eingin ivi. Brasilski leikarin hjá Milan; 25 ára gamli Kaka verður hann, sum vinnur Gylta Bóltin í 2007. 2. desember verður Gylti Bólturin so latin til vinnaran í beinleiðis sjónvarpssending. Tað er serliga brøgdini hjá Kaka í Champions League kappingini 2006/07, og tey 10 málini hann skeyt í kappingini, sum liggja til grund fyri, at Kaka er favorittur at gerast Ársins Leikari. Vinnarin í 2006; Fabio Cannavaro er heldur ikki í iva um, at Kaka fær flest atkvøður. Cannavaro er sjálvur millum teir 50 nomineraðu, men menn spáa honum ikki eitt pláss í fremstu røð hesuferð.

## 1 til 5 stig

Teir 96 ítróttarjournalistarnir sum skulu velja Ársins Leikara, skulu velja hann eftir einari serligari stigaskipan. Teir skulu lata ávikavist 5, 4, 3, 2 og 1 stig til teir fimm leikarnar, sum hesir halda hava uppiborið heiðurin. Tó er álagt teimum 96 ítróttarjournalistunum at vekta tvey ting. 1) Tað, sum leikarin hevur avrikað í 2007, og tað sum lið hansara hevur avrikað í 2007 (vunnin meistaraheitið o.l.) 2) Støði á leikaranum (talentið og fairplay), persónligheitin hjá leikaranum, og hvussu tað hevur gingist í samlaðu fótbólts-yrkisleiðini hjá leikaranum. Havandi hetta í huga, ger tað ikki favoritstøðuna hjá Kaka minni. Kaka er ein sera siðiligur leikari, sum gongur høgt uppí kristnu trúnna hjá sær. Bara ein norðurlendingur er millum teir 50 nomineraðu, og er tað svenski Zlatan Ibrahimovic. Nakrir í evropeiskum høpi ókendir leikarar úr Asia, og Norður- og Millumamerika eru eisini nomineraðir. Men teir eru óivað tiknir við, sum ein staðfesting um, at nú er Gylti Bólturin ein global atkvøðugreiðsla. Men hvussu er og ikki, so verður tað helst Kaka, ið fær heiðurin.